# Útbúgving sum heilsurøktari! Er tað nakað fyri teg?!



**Hvør kann gerast heilsurøktari??**

Tú, ið hevur áhuga fyri at arbeiða við fólki og sum hevur útbúgving sum heilsuhjálpari, ella hevur viðkomandi førleikar, sum eru grundaðir á útbúgvingarroyndir ella útbúgvingar- og arbeiðsroyndir, sum í minsta lagi taka somu tíð sum heilsuhjálparaútbúgvingin.

Heilsurøktaraútbúgvingin er ein sera breið útbúgving, har næmingarnir læra at síggja menniskja sum eina heild, bæði likamligt, sálarligt, alment og andaligt.

Hesar lærugreinir eru m.a. í útbúgvingini:

| **Natúrfak** | **Mentan og virksemi** | **Námsfrøði/ sálarfrøði** | **Almanna- og samfelagsfak** | **Heilsa og røkt** | **Sjúkralæra** |
|---|---|---|---|---|---|
| Føðslulæra, arbeiðsrørslur, flytihættir, persónligur stuðul, umsorgan, reinføri.<br><br>Kropsbygnaður, lívfrøði og mikrolívfrøði. | Virksemi og mentan.<br><br>Munurin at arbeiða á sjúkrahúsi og innan primera heilsuøkið.<br><br>At varveita førleikan tá ein gerst eldri. | Arbeiðisumhvørvi, samskifti.<br><br>Menniskjamenning og virðing.<br><br>Meistring av ymiskum umstøðum.<br><br>Gerandislív | Tagnarskyldan<br><br>Rættindi<br><br>Samfelagslæra<br><br>Lívskor og livihættir.<br><br>Lógir innan psykiatri.<br><br>Eldrapolitikkur | Sjúkrarøkt fyrr og nú.<br><br>Tørvir<br><br>Samstarv<br><br>At vera innlagdur.<br><br>Fyribyrgjan<br><br>Palliativ røkt<br><br>Eygleiðan<br><br>Sálarlig sjúkrarøkt. | Ígerðir á stovnum og hjá menniskjanum.<br><br>Tað fríska og sjúka menniskja.<br><br>Heilivágslæra.<br><br>Læran um eldri. |
|  |  |  |  |  |  |

**Endamál við útbúgvingini er m.a.:**
At geva næmingunum førleika at røkja stuðuls-, røktar- og umsorganaruppgávur á almanna- og heilsuøkinum og at menna áhuga og evni næminganna at taka lut í tí, sum fer fram í samfelagnum.

**Uppbygnaður:**
Útbúgvingin byrjar í viku 15 í 2006. Undirvísingin er uppbygd í evni og fyrigongur lutvíst í bólkum, sum trupulleikagrunda læring og eisini verður arbeitt við verkætlanum. Starvsvenjingin gongur fyri seg á ellisheimum, sambýlum og heimarøktini. Harumframt innan psykiatriøki og á vanligum sjúkrahúsdeildum. Útbúgvingin er nýggj og gevur førleika til sjálvstøðugt at røkja og leggja tilrættis samansettar ítrivs- og sjúkrarøktaruppgávur.

Tú fær útbúgvingarstuðul undir útbúgvingini.

**Umsóknarfreistin er 13. februrar 2006.**

Hevur tú hug at søkja, ella vil vita meira, so ert tú vælkomin at ringja á tlf. 372 855.

**HEILSUSKÚLI FØROYA**
Tvøroyri
www.skulin.fo/ahd - heilsuskuli@skulin.fo